## Ítróttargreinar kappast saman

Leygardagin verður Senta FM kapping í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Hetta eru føroyameistarakappingar hjá trimum av smærru ítróttargreinunum í Føroyum - borðtennis, judo og badminton. FM kappingarnar verða frá klokkan 14.00 til kl. 18.00 leygardagin, og Sjónvarpið hjá Kringvarpinum fer at senda finaludagin beinleiðis. Hugskotið við at hava tríggjar ítróttargreinar saman til FM kapping er at vaksa um áhugin fyri degnum – bæði millum fólk og fjølmiðlar. Á myndini síggjast finalistarnir hjá monnum í judo. Frá vinstru: Búgvi Hansen, Petur Sigurð Johannesen, Áki Davidsen, Hjalmar Johannesen og Jógvan Páll Kristiansen.

*Mynd: Sofus Debes Johannesen*





# Eingin hjálp frá Marna í kvøld

**VODAFONEUPPTAKT** Hart raktir sundalagsmenn skulu vitja Víking, sum er væl fyri við bæði leikarum og stigum

Rólant Waag Dam

Tredje gang er lykkens gang, siga danir. Í Sundalagnum søgdu onnur, at Marni gjørdi munin. Hvussu er og ikki, so verður Marni Djurhuus ikki við EB/Streymi, sum í kvøld vitjar í Sarpugerði.

Kollfirðingurin er farin aftur til Danmarkar og hevur ikki møguleika at koma heim, soleiðis sum loftferðslan skikkar sær. Samstundis má Heðin Askham eisini síggja burtur frá bæði Dánjal Davidsen, Brian Olsen og nýggja manninum David Udsen.

Hesir tríggir síðstnevndu vóru heldur ikki við seinast, men – við allari virðing fyri fótbóltinum í Suðuroynni – Víkingur á útivølli eigur at vera munandi torførari dystur, enn FC Suðuroy við Margáir.

### Píl upp hjá EB/Streymi

Síðani kappingin byrjaði, er tað bara gingið ein veg hjá EB/Streymi. Teir byrjaðu við tapi, háløðu síðani javnleik og eitt stig heim, áðrenn fyrsti sigurin og trý stig løgdust aftrat kontoini í triðja umfari.

Um tað er eitt tekin um, at Sundalagsmenn bara skuldu spæla seg heitar, er ilt at siga, men enn hava bara í brotum víst teirra veruliga potentiali,

Hinvegin hava Víkingar víst meira støðufesti, í øllum førum tá tað kemur til at fáa stig til hølvdar. Samstundis hava teir eisini víst, at teir avgjørt eru til at spæla við. Ikki minst, tá teir í fysta umfari lótu Argjamenn skora tríggjar ferðir í Sarpugerði.

Síðani hava teir bundið væl fyri og hava ikki latið mál ígjøgnum. Tískil er tað eisini lítið sannlíkt, at EB/Streymur fer at skora nógv mál í kvøld. Ikki minst tí, at Jógvan Martin Olsen kann seta liðið, sum honum lystir, tí hann hevur allar mans tøkar.

*rolant@sosialurin.fo*

# Fult fyri fjórðu ferð

**VODAFONEUPPTAKT** Sigfríður Clementsen og hansara menn fara eftir fjórða sigrinum á rað, hóast teir mugu vera minst fýra mans fyri uttan

Rólant Waag Dam

Ingi Højsted, Herbert í Lon Jacobsen, Bergur Midjord og Heini í Skorini. Eingin teirra er klárur at spæla sunnudagin. Samstundis er tað ivasamt, hvussu standurin hjá bæði Høgna Eysturoy og Símun Joensen er.

Flestu hesir høvdu ivaleyst byrjað inni undir vanligum umstøðum, men í ringasta føri má Sigfríður Clementsen síggja burtur frá øllum somlum. Tað hevði hann helst sæð øðrvísi, ikki minst tí, at tey úti á Argjum hava allar mans tøkar.

Støðan verður heldur ikki betri av, at B36 í roynd og veru hevði stórar trupulleikar av AB í fjør. B36 vann fyrstu uppgerðina í Gundadali, men tá teir komu út á Argir vann AB 3-1 og triðja og seinasta dystin, sum varð spældur í Gundadali, vann AB við tveimum málum móti ongum.

### Toppur móti botni

Tá hetta er sagt, so stendur eisini tann veruleiki eftir, at B36 er tað liðið, sum hevur skorað flest mál í deildini higartil – átta mál í trimum dystum, samstundis sum eingin hevur latið færri mál ígjøgnum enn teir. Hinvegin hevur AB latið tíggju mál í gjøgnum, og tað er meira enn trý mál í miðal hvønn dyst.

Málmunurin sæst eisini aftur í stigum. B36 er oddalið við fullum stigatali, meðan AB er í botninum við einum stigi. Vert er tó at hefta seg við, at hetta eina stigið kom á heimavølli, meðan hinir báðir dystirnir hava verið truplar útivallar uppgávur móti Víkingi og HB.

*rolant@sosialurin.fo*

# Uppflytararnir leita eftir sigrinum

**VODAFONEUPPTAKT** Bæði B71 og FC Suðuroy hava fingið stig, men hava framvegis fyrsta sigurin til góðar. Hesum fara liðini bæði eftir, tá tey møta áwíkavist ÍF og B68

Rólant Waag Dam

Suðuroyingar siga tað sjálvir. Á heimavølli fara teir eftir trimum stigum, hetta eisini hóast teir eru uppflytarar. Tískil verður tað eingin løtt uppgáva hjá Bill McLeod Jacobsen, sum tekur toftamenn til Suðuroynna um vikuskiftið.

Hinvegin hevur B68 longu spælt í móti hinum uppflytaraliðnum, og hólvaðu B71 av í fyrsta umfari. 5-0 endaði tann dysturin og tað var ikki eitt einasta mál ov nógv.

FC Suðuroy hevur ikki rent seg í nakað stórtap higartil. Faktiskt hava teir bara tapt ein dyst, tað var farna vikuskifti, tá EB/Streymur vann 2-0 við Margáir. Samstundis vóru suðuroyingarnir beinleiðis óhepnir við ikki at vinna dystin í Gundadali móti HB, meðan teir í øðrum umfari vóru meira enn hepnir við at fáa eitt stig burtur úr.

Í vikuni hava bæði Pól Jóhannus Justinussen og Ahmed Keita verið sjúkir, men helst vera hesir báðir við sunnudagin. Í FC Suðuroy vita tey ikki heilt hvussu tað verður við Dan Djurhuus og Súna úr Hørg, sum eru einastu ivamálini har.

### Fullmannaðir fuglfirðingar

ÍF byrjaði dystin við sigri á NSÍ, fylgdu so upp við javnleiki móti EB/Streymi, áðrenn teir taptu á útivølli móti B68. Nú eru teir so aftur á heimavølli, har allir mans eru tøkir. Eitt lítið ivamál er tó, og tað er hvussu standurin hjá Áka Petersen er. Hann hevur ikki vant í vikuni, men verður vónandi klárur sunnudagin.

Í B71 hava tey sama fólki klárt, sum tey hava havt hinar landskappingardystirnar. Tað merkir, at Predrag Markovic og Jóhannis Jensen framvegis eru skaddir.

*rolant@sosialurin.fo*